SJÚKRAHÚS VERKIÐ

# Urin til kanning fyri Chlamydia, Gonoré og Trichomonas

10 ml uringlas fæst á Rannsóknarstovuni ella til keyps á Apotekinum.

Tú skalt ikki hava kastað tær av vatninum tann seinasta tíman, áðrenn royndin verður tikin. Teir fyrstu 10 ml skulu brúkast.

Set strikukotu frá bíleggingarseðlinum á glasið.

Avlevera uringlasið og bíleggingarseðilin á einum av rannsóknarstovunum kring landið í seinasta lagi 3 tímar eftir, at royndin er tikin.

<table>
<tr><th colspan="3">Rannsóknarstovur í Sjúkrahúsverkinum</th></tr>
<tr>
<td>Landssjúkrahúsið<br>Prøvar í postkannan í Ambulatorium á B1, gerandisdagar kl. 08:00-14:00</td>
<td>Klaksvíkar Sjúkrahús<br>Á sjúkrahúsinum gerandisdagar kl. 08:00-10:00<br>Á Læknamiðstøðini í Gøtu hósdag kl. 08:15-09:30<br>Á Læknamiðstøðini í Runavík týsdag kl. 08:30-10:00</td>
<td>Suðuroyar Sjúkrahús<br>Á sjúkrahúsinum gerandisdagar kl. 08:00-13:00<br>Á Heilsumiðstøðini í Vági týs- og hósdag kl. 09:00-11:00</td>
</tr>
</table>